# FUNDARBÓK HJÁ VÁGS BÝRÁÐ 2014

| | | |
|---|---|---|
| **Fundur nr. 3**<br>**Tíð:** 17. mars 2014, kl. 19.00<br>**Stað:** Kommunuskrivstovan | **Skrivari:** Pól Thorsteinsson | |
| **Fastir fundardagar:**<br>28. januar, 17. februar, 17. mars,<br>28. apríl, 26. mai, 23. juni,<br>25. august, 29. september,<br>27. oktober, 24. november,<br>15. desember | **Møttir:**<br>Allir Býráðslimir | **Ikki á fundi:** |

**1) Mál nr.: 14/00059** Felag ynskir at leiga ella keypa BIP - støðina frá kommununi

**Frágreiðing um mál:**
Borgarstjórin leggur fram fyrispurning frá februar 2014 frá felagnum Holva – fish, har felagið spyr um loyvi til annaðhvørt at keypa hølini ella leiga seg inn. BIP – støðin er føst í teirra virkisbygningi á havnalagnum, men kommunan eigur BIP - støðina. Bæði Havna- og Fíggjarnevndin hava viðgjørt fyrispurningin í mars. Havnanevndin mælti til at selja ella leiga hølini til felagið. Fíggjarnevndin mælti til, at leiga hølini til felagið.

**Avgerð:**
Einmælt samtykt, at felagið fær loyvi at leiga ella keypa ognina.

**2) Mál nr.: 14/00066** Stuðul til sluppina Johannu TG326

**Frágreiðing um mál:**
Borgarstjórin leggur fram umsókn frá februar 2014 um stuðul til raksturin av sluppini Johanna TG 326. Fíggjarnevndin hevur á fundi í mars 2014 mælt til, at stuðla við vanligu upphæddini á kr. 60.000.

**Avgerð:**
Einmælt samtykt, at taka undir við Fíggjarnevndini.

Undirskriva:

**3) Mál nr.: 14/00068** Kommunan keypa matr nr 490d, e, g, i, og l frá Búnaðarstovuni

**Frágreiðing um mál:**
Borgarstjórin leggur fram mál um keyp av lendi framvið Laksá. Búnaðarstovan eigur lendi, ið ætlandi skal nýtast sum undirlendi undir smáttum. Tekniska- og Fíggjarnevndin mæla á fundi í mars til, at keypa lendi fyri smáar kr. 177.000. Vatngóðskan o.a. í Laksá verður kannað áðrenn farið verður í holt við sjálva byggingina av smáttunum.

**Avgerð:**
Einmælt samtykt at keypa lendi frá Búnaðarstovuni.

**4) Mál nr.: 14/00074** Umsókn viðvíkjandi matr nr 85a og 213

**Frágreiðing um mál:**
Borgarstjórin leggur fram umsókn viðvíkjandi tveimum matr nr á hjørninum Toftavegur / Krosslábrekku. Tekniska deild mælir frá, at loyva umsóknini.

**Avgerð:**
Einmælt samtykt, at beina málið aftur í Teknisku deild.

Undirskriva: